## FC Amager misti sigurin úr hondum

FC Amager spældi á útivølli ímóti fyrrverandi felagnum hjá Jákupi Mikkelsen, Herfølge í gjár. FC Amager byrjaði dystin væl, og longu eftir 11 minuttirs spæl hevði Søren Nielsen lagt FC Amager á odda 1-0. Tá 72 minuttir vóru spældir økti Anders Jochumsen til 2-0, og nú var bara hjá FC Amager at binda um sekkin. Men longu tveir minuttir seinni minkaði Kenneth Sørensen um munin til 1-2. Sjey minuttir seinni javnaði Peter Benjaminsen til endaliga úrslitið 2-2, og tvey týdningarmikil stig vóru gloppin FC Amager úr hondum.

## Stórsigur til ÍF Føroyar

Besta liðið hjá ÍF Føroyum hevur fingið góðan styrk eftir summarsteðgin, og seinnapartin leygardagin vísti hetta lið seg frá síni bestu síðu. 7-0 gjørdist úrslitið ímóti ØKF, sum er mannað við fótbóltsspælarum á Øresund kollegiet, har fleiri av føroysku leikarunum eisini búgva. Erling Fles, sum áður hevur gjørt fleiri mál fyri KÍ, gjørdi trý av málunum í gjár. Johan V. Gunnarsson, sum hevur spælt nógv í vinstru síðu hjá B36, gjørdi tvey av málinum. Hini bæði málini gjørdu ávíkavist Niels Joensen, fyrrverandi B36-miðvallari, og Pætur M. Dahl, sum er gamal HB-áleypari. ÍF Føroyar hevur nú 31 stig fyri 21 dystir. Hetta røkkur til eitt áttanda pláss í Seriu 1, sum annars telur 14 lið. Næsta uppgávan verður komandi vikuskifti, tá Rødovre, sum hevur átta stig færri enn ÍF Føroyar, kemur á vitjan.

# Torkil vann einkultstartin

**Sunnudagin skipaði Tórshavnar Súkklufelag fyri FM í einkultstarti. Kappingin skuldi verða leygardagin, men vegna regn og vind bleiv kappingin flutt. Sunnudagin var hinvegin av fagrasta veðrið, sól og bert lítil vindur**

SÚKKLING
*tíðindaskriv*

Hetta er fyrsta ferð at kappingin hevur verið hildin í Vágum. Start og mál var á vegnum við FK í Miðvági. Teinurin var frá FK eftir vatnavegnum niðan í brekkuna móti flogvøllinum og aftur til FK, hetta eru 10 km. Hesin teinum bleiv súkklaður ávíkavist tvær og tríggjar ferðir.

Hjá unglingunum stillaðu tveir ungir vágadreingir upp, hesir eru yngri enn unglingar, men tá teir høvdu hug at royna, so var eingin trupulleiki at lata teir verða við. Unglingarnir skuldu súkkla 20 km. Vinnari gjørdist Benjamin Thomassen, meðan Jóanis Albert Nielsen bleiv nummar tvey.



*Benjamin Thomassen var skjótastur av unglingunum, og kann hann nú rópa seg føroyameistara*

Hjá kvinnunum vísti Súsanna Skylv Sørensen enn einaferð, at hon kann seta fleiri av mannligu súkklarunum upp á pláss. Súsanna bleiv samanlagt nummar fimm, meðan hon vann kvinnukappingina.

Hjá monnunum vísti Torkil Veyhe, at hann er væl betri enn kappingarneytarnir. Torkil hevur nú, sum eisini fleiri aðrir, fingið sær eina einkultstartsúkklu. Sigast má, at hann longu er komin at sita rættiliga væl á súkkluni, sjálvur sigur hann, at súkklan følist perfekt.

Torkil vann Gudmund Joensen við umleið einum minutti. Gudmundur var 36 sekund frammanfyri Gunnar Dahl-Olsen, sum var 20 sekund framman fyri Sverra Mohr Edvinsson. Hesir fýra fremstu vóru væl framman fyri restina av súkklarunum.

Kári Simonsen vann kappingina fyri menn omanfyri 45 ár.

Annars eru luttakararnir á einum málið um, at hetta er ein góður teinur til síka kapping. Tað sum er eitt sindur óvanligt er, at eingin verulig brekka er á teininum. Hóast hetta so er rutan ikki sløtt, tí er hetta ein harður teinur til einkultstart. Kanska blívur hetta tann fasti teinurin til FM í einkultstarti.

## Kvinnulandsliðið úttikið



Um ein mánað skal kvinnulandsliðið í hondbólti til 4-landakapping í Sheffield í Onglandi. Sophus Dal Christiansen hevur nú tikið út bruttohópin til ferðina Í hópinum, sum Sophus Dal Christiansen hevur tikið út, eru hesar 22:

Jacklin Djurhuus Kyndil
Tomma Petersen Kyndil
Halla Midjord Kyndil
Anja Heinadóttir Neistin
Unn Kragesteen Neistin
Fríða Petersen Neistin
Elin Stakksund Neistin
Heidi Maria Akselsen Neistin
Tordis Tróndarson Neistin
Ninna Katrin Hansen Stíf
Rebekka Justinussen Stíf
Lovisa Andreasen Stíf
Durita Ljósstein Stjørnan
Durita Christophersen Stjørnan
Anna Kristian Samson Stjørnan
Laila Jespersen VB
Guðrið Mortensen VB
Katrin á Neystabø Neistin
Simona Hansen Freja
Rakul Augustinussen Neistin
Erla Eliassen Sindal/Tårs
Ása Dam á Neystabø Neistin

# Randi og Valur eru íslendskir meistarar

**Valur vann heili 8-0 á Stjarnuni í seinasta umfarinum**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið endaði landskappingin í bestu íslendsku kvinnudeildini. Ein av spælarunum í ár hevur her verið Randi S. Wardum, sum hevur vart málið hjá Vali, og tað hevur gingið við fullari ferð.

Seinasta dystin spældi Valur móti Stjarnuni, og tann dystin vann Valur 8-0. Støðan í hálvleikinum varð 3-0.

Margrét Lára Viðarsdóttir og Dóra Maria Lárusdóttir skoraðu báðar hattrick í stórsigrinum.

Eftir 18 umfør hava valskvinnur 51 stig, bert 3 stig frá fullum stigatali. Valskvinnur hava ein so knúsandi málmun, sum 91-15. Lokalu arvafiggindarnir úr KR gjørdust nr. 2 við 48 stigum. KR hevur málmunin 61-15. Valur tapti bert ein dyst í kappingini, og varð tað ímóti júst KR.

Randi Wardum hevur skrivað søgu hesa vikuna. Hon er fyrsta føroyska kvinnan, sum vinnur meistaraheitið í fótbólti í einum øðrum FIFA-landi. Hon er eisini fyrsti føroyski fótbóltsspælarin yvirhøvur, sum er við á einum liði, sum hevur vunnið sær sætið millum 16 tey fremstu liðini í einari Evropa Cup kapping.

Í døgunum frá 9. til 14. oktober skulu Randi og Valskvinnur taka lut í næsta bólkaspælinum í UEFA Womens Cup. Tað verður í Umeå í Norður-Svøríki. Millum mótstøðuliðini, umframt vertsliðið, Umeå verður eisini italska meistaraliðið, Verona. Portalurin ynskir Randi Wardum tillukku við brøgdunum.

| Urslit, súkkling | | |
|---|---|---|
| **Unglingar 20 km** | **Tíð** | **Ferð km/t** |
| Benjamin Thomassen | 42.30 | 28,37 |
| Jóanis Albert Nielsen | 45.43 | 26,41 |
| **Vaksin 30 km** | **Tíð** | **Ferð km/t** |
| Torkil Veyhe | 44.48 | 40,47 |
| Gudmund Joensen | 45.44 | 39,61 |
| Gunnar Dahl-Olsen | 46.30 | 38,88 |
| Sverri Mohr Edvinsson | 46.50 | 38,70 |
| Súsanna Skylv Sørensen | 52.24 | 34,46 |
| Høgni Øster | 55.17 | 32,63 |
| Hans Egholm | 57.50 | 31,30 |
| Kári Simonsen | 58.46 | 30,82 |
| **Kvinnur 30 km** | **Tíð** | **Ferð km/t** |
| Sýsanna Skylv Sørensen | 52.48 | 34,46 |
| **Menn yvir 45 ár 30 km** | **Tíð** | **Ferð km/t** |
| Kári Simonsen | 58.46 | 30,82 |